Jólahugni



# Sólarn Solmunde

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
Veit als ikki, men eg vænti, at tað verður sum vanligt við familju, nógvum mati og góðum hugna.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
Eina rúgvu av kjøti, dunnu, gás, ræst kjøt og annað lambakjøt, hvat er tað ikki deiligt, eg eri sera matglaður;)

*Hvat er tað besta við jólum?*
At hava frí og at hava tíð at verða saman við familjuni.

*Hvat er minni gott við jólum?*
Tað at fólk generelt gloyma, hví vit halda jól, og at pengapungurin ikki strekkir til. Jólini eru vorðin ein hátíð har flest dyrka Mammon, heldur enn Várharra.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
Nei, jólini í Føroyum eru góð!

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
Tað er tónleikur, ið bara eigur at verða har á jólum, men tað sigur mær ikki so nógv. Tað er bakgrundstónleikur.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Púra líka mikið, hosur og undirbuksur, bara ein hevur tað gott, tað hevur alt at siga.




















